TVØROYRAR KOMMUNA

# Dagrøktin í Tvøroyrar kommunu

Søkt verður eftir dagrøktara til ansing av børnum í Hvalba í ½ tíð seinnapart

**Vit vænta av tær:**

- At tú hevur góðar umstøður, at hava børn, bæði inni og uttanfyri..
- At tú tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- At tú vísir virðing fyri børnunum,foreldrum og starvsfeløgum.
- At tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir.
- At tú ert tolin og vísir umsorgan.
- At tú hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- At tú dugir at sýggja møguleikar í staðin fyri forðingar.
- At tú hevur roykfrítt og viðkvæmisvinarligt heim.

Í dagrøktarskipanini í Hvalba starvast 6 dagrøktarar og ein leiðari.

Talið av børnum í dagrøktini eru 27 børn

Ein dag um vikuna eru dagrøktarnir saman við børnunum í spælistovuni.

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 – 17.15

Vit kunnu bjóða tær starv í góðum og tryggum arbeiðsumstøðum, við góðum og álítandi samstarvsfeløgum

Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til dagrøktarleiðaran í Tvøroyrar kommunu á tlf. 211339 og tosa við dagrøktarleiðaran Súsannu Poulsen

**Umsóknarfreist: 17 apríl 2008, kl.16.00**

Vinarliga send umsókn tygara til

**Tvøroyrar kommunu**
Dagrøktarskipanin
800 Tvøroyri

FRÁ MIÐVÁGS ARBEIÐARAFELAG

Aðalfundur verður 19. apríl 2008

***Nevndin***

SERNÁMSDEPILIN

# Talilærari

**Í Sernámsdeplinum er eitt starv sum talilærari leyst til setan skjótast til ber.**

**Uppgávur**
Fyribils er høvuðsuppgávan endurvenjing av heilaskaddum vaksnum við talubreki. Í samstarvi við Landssjúkrahúsið fer støðukanningin og fyrsta viðgerðin fram á sjúkrahúsinum. Tá sjúklingurin verður útskrivaður, ger talilærarin tilmælandi frágreiðing og vegleiðir avvarðandi eftir tørvi. Eftir umstøðunum kann talilærarin eisini geva ambulanta viðgerð og í samráð við onnur í samskiftisdeildini í Sernámsdeplinum vegleiða í endurvenjingararbeiði úti um landið.

Talilærarin er ein av tvørfakliga toyminum í Sernámsdeplinum og má vera sinnaður til at átaka sær aðrar sernámsfrøðiligar uppgávur eftir umstøðunum, eins og hann er tilvitaður um setningin hjá Sernámsdeplinum, ið er at menna sernámsfrøðiliga virksemið og tænastustøðið í øllum landinum.

**Førleikakrav**
Útbúgvin talilærari, audiologopedur, pedagogur ella lærari við serlæraraútbúgving ella á annan hátt útbúgvin/ eftirútbúgvin umsøkjari við royndum at arbeiða við taluvenjing/ -viðgerð.

**Løn**
Eftir sáttmála við avvarðandi Fakfelag.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møguligum viðmælum eigur at vera Sernámsdeplinum í hendi tann 18. apríl 2008.

Meira fæst at vita við at venda sær til Egon Hansen, tali – hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Tlf. 314522 – Fax 310196
E – postur: sernamsdepilin@snd.fo

Atlantic Brokers Ltd

**Djúpvatnstrolarin PHOENIX**



Um hóskandi boð fæst verður djúpvatnstrolarin PHOENIX seldur **við loyvum**.
Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tel.: 312230 / 212230
sc@atlantic-brokers.com
www.atlantic-brokers.com

HAVNAR FIMLEIKAFELAG 1909

## Fimleikaframsýningarnar hjá Havnar Fimleikafelag

verða í ítróttarhøllini á Hálsi hesar dagar:

| | | |
|---|---|---|
| Leygardagin 5. apríl kl. 13.00 | børn 1½-6 ár | |
| Leygardagin 5. apríl kl. 16.00 | børn og ung, 1. fl.-5. fl. | |
| Mánadagin 7. apríl kl. 19.00 | ung og vaksin, 6. fl. og eldri | |

**Havnar Fimleikafelag**

# Skráseting Føroya

FELAGSSKRÁSETING
Boks 264 · FO-110 Tórshavn · Tlf.: 35 60 10
Faks: 35 60 15 · T-postur: skr@skraseting.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 5137
**Navn:** Sp/f Brekkan
**Adressa:** Mouritsargøta 15, 188 Hoyvík
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 10-03-2008
**Viðtøkudato:** 10-03-2008
**Stovnarar:** Eyðun Augustinussen, Mouritsarvegur 15, 188 Hoyvík
**Stjórn:** Eyðun Augustinussen, Mouritsarvegur 15, 188 Hoyvík, (stjóri)
**Grannskoðari:** Óli Regin Hansen skrásettur, grannskoðari, Tróndargøta 39, 110 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 125.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 125.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handverk, handil, ídnað, keyp-, sølu og útleigan av fastogn og annað starv í hesum sambandi.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 10.03.2008 - 31.12.2008

*Skráseting Føroya tann 03. apríl 2008*
*Kristin Balle*

## Ov tíðliga í verðina



Í Prematurfelagnum stuðla og ráðgeva vit foreldrum at ov tíðliga føddum børnum.

Telefonlinja okkara svarar mánadag til hósdag á tlf 263868

Eisini ber til at skriva til okkara á prematur@post.olivant.fo

# Lesið Sosialin -so eru tit við!